

# Leyst starv í Tórshavnar kommunu

## Hjálparfólk til Býlingshúsið millum Gilja

Søkt verður eftir einum **hjálparfólki,** til barnagarðsstovu, at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1. apríl 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, 188 Hoyvík, í seinasta lagi mánadagin 23. mars 2009.

**Nærri fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Jónu Guttesen, leiðara, á telefon 30 22 22, 27 25 45, ella við at hyggja at heimasíðu okkara www.123hjemmeside.dk/millum-gilja

**Tórshavnar kommuna**

## DEKKARI

*til Magnus Heinason*

Søkt verður eftir dekkara til Magnus Heinason at byrja í apríl 2009.

Tann, ið settur verður, skal hava heilsuváttan fyri sjófólk. Umframt skal hann hava góð samstarvsevni og vera røkin. Tað er ein fyrimunur at hava góðan kunnleika til trolreiðskap.

Lønar- og setanartreytir eru sbrt. sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Erling í Liða, reiðara (tlf. 35 39 00, e-post: erlingl@frs.fo).

Umsóknarfreistin er mánadagin 16. mars 2009.

Skrivligar umsóknir við viðmælum ella líknandi skulu sendast Fiskirannsóknarstovuni.

Merkið brævbjálvan „Dekkari".

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fiskirannsóknarstovan
Postrúm 3051, Nóatún
110 Tórshavn, Føroyar

Tel. +298 35 39 00
Fax +298 35 39 01

## Mentamálaráðið
Mentamáladeildin

### Stuðul til mentanarlig tiltøk

Sambært Løgtingslóg nr. 60 frá 17.05. 2005 er peningur settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til tiltøk og verkætlanir innan mentan og list.

Stuðulin verður játtaður sum verkætlanarstuðul ella annar stuðul til einstaklingar, bólkar ella feløg.

Játtanin í 2009 er kr. 1.200.000.

**Freistin at søkja er 15. mars 2009**

GG! Umsóknir um stuðul til fløgu- og bókaútgávu skulu sendast til Mentanargrunn Landsins.

### Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálaráðið umvegis Sp/f Ítróttarvedding fær burtur av veddingarpeninginum, verður nýtt sum stuðul til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja.

Játtanin verður vanliga upplýst á aðalfundi hjá Sp/f Ítróttarvedding í mai. Upplýsast kann, at játtanin í 2008 var kr. 1.819.000.

**Freistin at søkja er 15. apríl 2009.**

### Stuðul til myndlistafólk

Peningur er settur av á løgtingsfíggjarlógini til stuðul til myndlistafólk. Listafólk, sum eru undir útbúgving, kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir.

Tá stuðul verður játtaður, verður raðfest í fyrstu atløgu at veita yrkislistafólkum stuðul og í aðru atløgu umsøkjarum, ið eru á eini listarligari yrkisleið.

Játtanin í 2009 er kr. 100.000

**Freistin at søkja er 15. mars 2009.**

Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á heimasíðu okkara: www.mmr.fo ella kunnu fáast við at venda sær til:

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Telefon 35 50 50 · Telefax 35 50 55
e-postur.: mmr@mmr.fo




Les Sosialin so ert tú við




www.sosialurin.fo

W W W . N O R M E K . F O
NORMEK




Tróndargøta 63 · FO-512 Norðragøta
Tlf 442002 · normek@normek.fo